## DAGSINS MEINING

# Musikkskúlin

Síðan Musikkskúlin varð skorin við hálvari millión hevur alt verið á gosi. Hetta hevir verið eitt mál, sum pressan, eisini vit her á blaðnum, hava gingið høgt uppí. Orsøkin er sjálvandi, at Musikkskúlin er so ómetaliga væl umtóktur millum børn og foreldur. Musikkskúlin hevur havt ómetaliga stóran týdning fyri trivnaðinum hjá føroyskum ungdómi. Hesin stovnur hevur givið møguleikar hjá ungum talentum at menna seg til røtt tónlistafólk, og stovnurin hevur givð øllum hinum ein góðan møguleika at læra seg at leika á eitthvørt ljóðføri. Hetta at duga at handfara eitt ljóðføri er ein ómetaliga stórur fyrimunur í lívinum. Tónleikur er mennandi fyri likam og sál. Sostatt er vælskiljandi at foreldur og pressan hava verið á gosi.

Nú hevur landsstýrið so tikið avleiðingarnar av hesum mongu atfinningum og mælt til at veita Musikkskúlanum eykajáttan. Hetta er sera gott og tænir landsstýrinum til sóma. Hetta er at viðurkenna, at vit kunnu ikki vera ein vælvirkandi Musikkskúla fyri uttan. Tað er einki at ivast í, at føroyski almenningurin sum heild tekur undir við, at Musikkskúlanum verður latin ein eykajáttan, sum loyvir skúlanum at halda fram við sínum verandi virksemi. Tað hava verið røddir frammi við atfinningum móti uppskotinum um at taka peningin frá løgujáttan til listaskúla á Sandi. Sum tað skiltist á landsstýrismanninum í ÚF í fyrradagin, so hendir eingin vanlukka við hesum. Hetta fíggjarárið er so langt umliðið, at tað heilt einfalt ikki letur seg gera at framja nakra íløgu í listaskáulan á Sandi. Sum tað skiltist er einki projekterað og tískil er valla møguligt at bjóða nakað arbeiði út í ár.

Tað má væntast og krevjast av øllum flokkum í fíggjarnevndini, at teir taka undir við uppskoti landsstýrisins um eykajáttan til Musikkskúlan. Her er ein vælvirkandi stovnur, sum enn ikki er fallin fyri spariknívinum, sum hendan samgonga tíverri hevjar yvir alt feltið eins og tann undanfarna samgongan gjørdi. Her hava fíggjarnevndarlimirnir eitt gott høvi at gera eina góða gerð og tað vænta vit øll, at teir fara at gera. Hetta eigur eisini at vera galdandi fyri tann nevndarlimin, ið fyrradagin í útvarpinum sum vísti seg sum rættiliga negativan.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Vit hildu lyftið – Musikskúlin fær C-vitaminir

**Eins og lovað, fær Musikskúlin nú tær 450 túsund krónurnar, honum tørvar fyri at halda fram við verandi virksemi. Hetta verður gjørt, hóast tjóðveldistingmaðurin, Páll á Reynatúgvu, alment hevur mótmælt ætlanini**

**John Johannessen**
*tinglimur fyri Javnaðarflokkin*
*mentanarnevndin*
*john@jokarin.com*



Musikskúlin sleppur at halda fram við verandi virksemi. Tað er greitt, nú samgongan hevur avgjørt at útvega skúlanum 450 túsund krónur afturat verandi játtan. Hetta er eitt beinleiðis úrslit av, at Javnaðarflokkurin hevur staðið fast við lyftið um C-vitaminirnar.

Tað er bert spell, at Tjóðveldisflokkurin, sum hevur útnevnt seg sjálvan til verja hjá mentanini, í útvarpstíðindunum á middegi mikudagin boðaði frá, at hann fer at arbeiða ímóti ætlanini, um at útvega Musikskúlanum neyðugu pengarnar.

**Listaskúli í klemmu**

Fyri ikki at økja um hallið á fíggjarlógini enn meira, hevur samgongan gjørt av, at tær 450 túsund krónurnar til musikskúlan verða tiknar burtur av teimum 500 túsund krónunum, ið eru settar av til Listaskúla í Sandoynni

Helst er hetta orsøkin til, at fíggjarnevndarlimur Tjóðveldisfloksins noktar fyri at hjálpa Musikskúlanum.

Men veruleikin er, at ætlanin við Listaskúlanum á Sandoynni er ikki komin so mikið lagt, at brúk er fyri teimum 500 túsund krónunum. Enn er ætlanin um Listaskúlan lítið meira enn eitt hugskot hjá Páll á Reynatúgvu og Tjóðveldisflokkinum. Eitt hugskot, sum als ikki er vorðið nóg ítøkiligt at seta í verk enn.

Tí hevur samgongan valt at brúka peningin til at hava musikskúlan á einum nøktandi støði, heldur enn at fara undir nýggjar ófyrireikaðar verkætlanir eftir kravi frá Tjóðveldisflokkinum.

**Lokalpolitiskt valagn**

Javnaðarflokkurin vil sjálvsagt Sandoynni væl og vil sjálvsagt eisini virka fyri mentanarligum frambrotum í Sandoynni. Men veruleikin við Listaskúlanum er, at talan er ikki um annað, enn eitt ófyrireikað persónligt lokalpolitiskt valagn hjá Páll á Reynatúgvu, sum fíggjarnevndin var noydd til at taka undir við eftir kravi frá fíggjarnevndarlimunum, Páll á Reynatúgvu, fyri at fáa semju um fíggjarlógina. Hesin sami fíggjarnevndarlimurin var við til at skerja játtanina til Musikskúlan og vil nú ikki bøta skaðan.

3. mars í ár legði Páll á Reynatúgvu uppskot fyri løgtingið, um at byggja Ítróttarskúla á Sandoynni. Sama uppskot broytti hann 16. apríl til at vera Lista- og tónleikaskúla. Hetta átti at givið eina mynd av, hvussu illa fyrireikað ætlanin er.

Mær tykir, at tingmaðurin bara vil hava ein ella annan bygning bygdan á Sandoynni, fyri at fáa ein lokalpolitiskan varða av sær sjálvum. Og so lætt eigur klaverið ikki at spæla.

Nú eru 50 túsund krónur eftir í Mentamáláráðnum at finna útav, um møguleiki er fyri og tørvur er á at skipa ein Listaskúla á Sandoynni. Tá hetta fyrireikingararbeiðið er liðugt, er Javnaðarflokkurin sinnaður at taka støðu til ætlanina av nýggjum.

# Viðmerkingar til rutuna Skopun- Gamlarætt

**Eyðbjørg Hentze**

Nú hava vit hoyrt Gerhard Lognberg tosað um, at hann vil hava ein túr av Gomlurætt seint á kvøldi til fyrimun fyri fólk úr Sandoynni, sum arbeiða ella hava eitthvørt ørindi í Havn.

Men mín áhugi er meira vendur móti bussunum.

Tað er ferð eftir ferð, at fólk standa sum Kánus við ferjuleguna á Gomlurætt og Skopun, tí eingin bussur er.

Tað eru hóast alt ikki øll, sum ferðast við bili. Og tað er eisini nógv dýrari, tá tú ferðast ofta.

Tí haldi eg, at tit skuldu fingið til og frá skipinum til hvønn túr, áðrenn tit byrja at grenja um fleiri túrar.

Tað nýtist ikki at vera teir stóru bussarnir, sum koyra, um lítið fólk er. Tað kann til dømis vera tilkalling ella okkurt líknandi.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**

Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Kære Lisbeth og Høgni!

**Leif Jacobsen**
*Maskinmester, Albertslund*

Jeg håber, at I sammen med mig og andre vil være med til at ændre en urimelig skat i Danmark.

Hvorfor skal jeg udsættes for en skat, der kommer som en tyv om natten, blot fordi jeg valgte den forkerte dag på året at tilmelde mig folkeregisteret i forbindelse med, at jeg flyttede fra Færøerne til Danmark sidste år? Ved nærmere undersøgelse har jeg erfaret, at det samme er gældende for personer, der framelder sig folkeregisteret en anden dag end 1. januar.

Denne skat, som jeg kalder en "etnisk" særskat er de kontante konsekvenser af følgende:

Bekendtgørelse af lov om indkomstskat for personer m.v. (personskatteloven) [1)]: I §§ 14 omtales en såkaldt nøgle til omregning i forhold til hvor længe man har opholdt sig i landet, som med matematisk nøjagtighed straffer og påfører omtalte personer en særskat:

*"Omregning*

*§ **14**. Omfatter indkomstansættelsen for en person en kortere periode end 1 år, omregnes såvel den skattepligtige indkomst som den personlige indkomst og kapitalindkomsten således, at beløbene kommer til at svare til et helt års indkomster. På grundlag af de opgjorte helårsindkomster beregnes helårsskat efter §§ 6-9 (som giver anvisning om, hvordan der skal beregnes indkomstskat for en skatteborger bosat i Danmark hele året, m.a.). Den beregnede helårsskat nedsættes efter forholdet mellem delårsbeløbene og helårsbeløbene."*

Det lyder jo helt tilfor-ladeligt, at indkomsten omregnes således, at beløbene kommer til at svare til et helt års indkomst. Men faktisk er følgerne af §§ 14, en ekstra skat på især de etniske minoriteter i Danmark, også færinger, man kunne næsten kalde den for en etnisk særskat. Jeg tilhører den færøske minoritet i Danmark og har genn-em hele livet haft kontakt med min familie på Færøerne. Derfor måtte jeg sidste år betale 20.000 kroner mere i skat end en såkaldt almindelig dansker. I den her forbindelse er, hvem som helst med folkeregisteradresse i Danmark, en almindelig dansker. Jeg tilmeldte mig folkeregisteret den 1.7., det skulle jeg aldrig have gjort. Når man kommer fra udlandet, er der ifølge §§ 14 rent matematisk kun en dato, man kan tilmelde eller gentilmelde sig folkeregisteret: 1. januar, alle andre datoer vil rent matematisk og i virkeligheden give et i nogle tilfælde overordentligt stort skattesmæk.

Lad mig forsøge at sætte kød og blod på denne problemstilling. Vi forestiller os en maskinmester, bosiddende på Færøerne, som på et år kan nøjes med at tage en sammenhængende hyre på 3 til 4 måneder, og begynder først at tænke på den næste hyre efter en lang ferie. Vores maskinmester holder ferie de første 8 måneder af 2003. 1.9. tilmelder han sig folkeregisteret i Danmark. Samtidigt får han en hyre og dermed en lønindkomst på 300.000 kroner i de sidste måneder af 2003, hvilket ikke er umuligt på de bedste notbåde. Med matematisk nøjagtighed bliver der ved hjælp af §§ 14 pålagt maskinmesteren en ekstra skat på 43.000 kroner i forhold til en almindelig dansker. Oveni de ekstra omkostninger ved at flytte får han så denne særlige "etniske" skat på 43.000 kroner. Til sidst vil jeg vise denne lovs uretfærdighed, især overfor etniske minoriteter, hvis vi forestiller os, at maskinmesteren rejser ud af landet og dermed framelder sin folkeregisteradresse i Danmark den 1.4. 2004. På nuværende tidspunkt ved jeg ikke, hvordan satserne i personskattelovens §§ 14 bliver for 2004, men hvis de fortsætter uden ændringer i forhold til 2003, kan vi forestille os, at han fortsætter sin hyre ind i de første 4 måneder af 2004 og opnår derved igen en årsindtægt på 300.000 kroner, hvis han holder ferie resten af året. Han kommer til at betale næsten 49.000 kroner mere end en person med 300.000 kroner i lønindkomst i 2004, kun fordi han frameldte sig folkeregisteret på en anden dag end den 1. januar. Samlet kommer han til at betale 92.000 kroner mere i skat over 2 år end en person, som har haft folkeregisteradresse i Danmark i hele samme periode. Men det går først op for ham, at han er blevet flået i skat, når han har foretaget disse til- og fraflytninger, derfor kommer denne særskat som en tyv om natten.

Men det er ikke kun højtlønnede der bliver udsat for denne urimelighed. Et andet eksempel kunne være en indvandrer, som tilmelder sig folkeregisteret den 1.7. 2003 . Lad os sige at han tjener 150.000 kroner ved at køre taxi efter han er kommet til Danmark. Han kommer til at betale næsten 9.000 kroner mere end en almindelig dansker. Hvis han rejser ud af landet og dermed framelder sig folkeregisteradresse den 1.7.2004, vil han højst sandsynlig betale ekstra 9.000 kroner. Altså en samlet ekstra skat på 18.000 kroner over 2 år.

Jeg skriver anførselstegn omkring etnisk, fordi ikke kun de etniske minoriteter og deres efterkommere er i farezonen for at blive udsat for denne i hovedsagen etniske særskat. Enhver, som tilmelder eller framelder sig folkeregisteret på en hvilken som helst anden dag end den 1. januar, vil blive pålignet denne "etniske" særskat.

# Stjórnarrit 5 - Tingnevndir

TÍÐINDASKRIV
*Formansskapurin í grundlógarnevndini*

Stjórnarskipan Føroya. Formansskapurin í nevndini tekur nú upp spurningin um heimildir og arbeiðslag hjá tingnevndum.

Løgtingið eins og øll onnur ting hevur so leingi vit vita um skipað arbeiðið hjá sær í deildir ella nevndir. Gamla løgtingið hevði bæði deild, ið umrøddi almenn mál og gjørdi samtyktir, og løgrættu, ið eisini virkaði í fleiri deildum.

Orsøkirnar til at hava tingnevndir eru fyri ein part praktiskar. Tað ber ikki til at umrøða allar spurningar í tingsalinum, tíðin er ikki til tað, og nevndirnar kunnu arbeiða á annan hátt.

Men orsøkirnar til at býta tingið upp stinga nógv djypri enn bert til at leggja virksemi til rættis. Sjálvt fólkaræðið og fólksins frælsi verður tryggjað ígjøgnum tað valdsbýti og tær mannagongdir, sum liggja í at býta tingið upp í deildir.

Í mongum londum er tingið býtt sundur í tvær tingdeildir við hvør síni manning og hvør sínum nevndum. Hetta er enn siður í Noregi og var tað eisini í hinum Norðanlondunum fyrr. Í londum sum okkara, har øll tingfólk eru limir í sama kamari, er tað so mikið neyðugari, at tingnevndirnar geva okkum sama tryggleika sum atskildar tingdeildir.

Nevndirnar gera, at tey fólkavaldu fáa innlit í og kunnleika til lóggávu og fyrisitingarøki og megna tí betur at standa ímóti fyrisitarum og seráhugamálum, ið kunnu mæla til politikk, ið stríður ímóti heildaráhugamálum ella gongur rættindum hjá einstøkum ov nær.

Nevndirnar økja eisini um møguleikan fyri dissensi og kjaki í politisku skipanini. Nevndirnar gera, at tað er neyðugt at vinna undirtøku fyri sama uppskoti í tveimum fólkavaldum hølum - bæði í tingsalinum og í nevndini. Ein minniluti, ið kennir sera væl til eitt evni og tí ikki letur seg taka av fótum av lógaruppskotum frá fyrisitingini ella øsing í miðlunum, kann lættari koma fram við sínum kunnleika og sjónarmiðum í nevndini, har sannføra hinar nevndarlimirnar, og síðani kann ta betra sjónarmiðið - sum at byrja við var í minniluta - vinna fram í øllum tinginum.

At styrkja nevndirnar og harvið fólkaræðiliga tryggleikan hjá okkum øllum, skjóta vit í fyrra flaggdagsálitnum tí upp ávís tiltøk:

At hava nevndarviðgerð áðrenn fyrstu viðgerð í salinum. Hetta tryggjar okkum ímóti, at flokkarnir taka støðu sum nú uttan til fulnar at hava umhugsað málið og uttan at hava hoyrt, hvat køn fólk, innan eins og uttan tinggátt, hava at siga um málið. Er tað neyðugt, ber sjálvsagt til at hava eina ella fleiri nevndarviðgerðar afturat eftir viðgerð í salinum.

At hava almennar hoyringar sum part av viðgerðini í nevndunum. Slíkar hoyringar fara at gera tað lættari hjá teimum, ið hava eina støðu til mál ella eru serkøn á økinum at føra fram sjónarmið síni. Í dag er einasta hoyring skrivlig hoyring grundað á liðug lógaruppskot, skrivlig hoyring, ið verður send útvaldum til skrivligar viðmerkingar innan stutta freist. At siga tað, sum sigast skal, er mangan nógv betri enn at skriva tað - og munin lættari.

At áleggja øllum skyldu at møta fyri tingnevnd at greiða nevndini frá viðurskiftum, tey kenna til ella hava skil fyri. Tað átti at verið sjálvsagt, at tá fyrisiting og dómstólar - og lægri myndugleikar - kunnu kravja at fáa fatur á øllum viðkomandi kunnleika, so eigur tingið, ið ger tær lógir, sum fyrisiting og rættir virka eftir, so mikið meira at hava kunnleika til alt viðkomandi í tingmálum.

At geva nevndunum rætt at steðga lógaruppskotum. Nevndirnar umboða fólkið á annan hátt en tingið alt; meðan tingsalurin er alumboðandi, so eru nevndirnar serumboðandi, tí tingfólk fara í tær nevndir, tey hava størstan áhuga fyri.

At geva nevndunum rætt at seta undirnevndir. Hesar kunnu hugsast at verða settar at orða lógaruppskot, viðgera einstøk uppskot nærri, kanna hvussu lógir hava virkað, ella hvussu fyrisitingin umsitur tær, endurskoða politikk landsins ella annað, ið ikki øll nevndin í fyrstu atløgu hevur umstøður til at taka sær av.

At geva nevndunum heimild at orða lógaruppskot, tá politisk semja er um endamál ella ætlan, men t.d. onki uppskot er á tingborði um hetta evni.

Ætlandi fara hesar broytingar at tryggja fólkaræði, umboðan, ávirkan fólksins, og at bøta um lógirnar og dygdina í fyrireikingunum.

# Áheitan til Landsins myndugleikar

Undirritaðu feløg vilja við hesum heita á landsins myndugleikar um at taka neyðugu stigini til at forða fyri, at fiskur veiddur í føroyskum sjóøki framhaldandi fer ótilvirkaður av landinum.

Vit skulu minna á, at fiskurin er ogn Føroya fólks, og tað er tí ábyrgdin hjá okkara politiska myndugleika, at tryggja, at hesin fiskur eisini kemur øllum føroyingum til góðar.

Sum støðan er nú, so verða arbeiðspláss beinleiðis útflutt úr Føroyum saman við fiskinum, tí tann fiskur, sum sjálvsagt skuldi verið tilvirkaður og góðskaður her heima, verður fluttur uttanlands, har hann skapar arbeiði til túsundtals arbeiðsfólk.

Støðan er rættuliga álvarslig, tí alsamt økta mongdin av fiski, sum fer av landinum ótilvirkaður, økir um arbeiðsloysi í samfelag okkara og ta samfelagskreppu hetta fer at føra við sær.

Tað er einki órímuligt í, at fólk sum hava sítt livibreyð av fiskivinnuni á landi, krevja, at landsins myndugleikar taka neyðugu stigini til at tryggja okkum, at so nógv sum gjørligt av fiskinum verður tilvirkaður í Føroyum.

Vit vóna, at okkara politikarar vísa sína ábyrgd og beinanvegin taka neyðugu stigini til at tryggja, at forðað verður fyri, at fiskur í stórum nøgdum framhaldandi fer ótilvirkaður av landinum.

*Tórshavn, tann 15. juli 2004*

**Føroya Arbeiðarafelag**

**Havnar Arbeiðsmannafelag**

**Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag**

**Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag**

**Havnar Arbeiðskvinnufelag**